DAGSINS MEINING

Ábyrgd fyri náttúru og umhvørvi

Tað tykist sum fólk flest hava gloymt alt rokið, ið stóðst av, at SEV fór undir at úbyggja vatnorkuna í Eysturoy, eitt nú við at seta stór øki undir vatn og tøma flestu áir í norðaru helvt av Eysturoy. Hetta var eitt stórt mál, og ein og hvør, sum ferðast í norðaru helvt í Eysturoy ein regndag kann við egnum eygum síggja fylgjurnar av hesum inntrivi.

Nú ætlar SEV so at fara undir síðsta part av hesi stóru verkætlan. Gongur, sum SEV ætlar, so fara eitt nú at kalla allar áir við Skálafjørðin at hvørva. Hetta er enn eitt ómetaliga stórt inntriv í náttúruna. Spurningurin er tí, um vit ikki eiga at steðga á eina tíð og umhugsa framtíðar orkuútbyggingina. Vit eiga at seta okkum nakrar spurningar sum t.d. hvussu nógv av okkara vøkru men sera lítlu náttúru skulu vit offra fyri at fáa orku? Er hetta bíligasta orka, vit kunnu fáa? Hvussu takla vit spurningin um alternativa orku t.d. vind og havstreym? Hvussu verður tá, ið oljan verður funnin?

Tað er eingin, sum vil nokta brúkarum og vinnulívi orku. Men eiga vit ikki her og nú at fara undir at orða ein nýggjan orkupolitikk? Er tað ikki uppá tíðina, at vit nú viðurkenna, at vit øll, land, kommunur og borgarar hava eina stóra ábyrgd fyir náttúru og umhvørvi? Víðari kunnu vit spyrja, um tað veruliga er rímuligt, at ein kommunalur felagsskapur sum SEV hevur einkarætt til eitt so fundamentalt tilfeingi sum vatn? Hetta var ivaleyst bæði neyðugt og skilagott fyri 40 árum síðan, men er hetta rímuligt, soleiðis, sum Verðin sær út í dag?

Tað verður í hesum tíðum um allan tann framkomna heim talað um bleyt virði. Náttúran er eitt av hesum bleytu virðum. Tað, sum verður týnt, kemur aldri aftur, og tí eiga vit at hugsa okkum væl um, áðrenn vit broyta grundleggjandi fortreytir í náttúru og umhvørvi. Gera vit hetta, eiga vit at gera hetta undir ábyrgd fyri náttúru og umhvørvi. Vísa vit ikki ábyrgd, synda vit ikki bert móti náttúru og umhvørvi, vit synda eisini móti komandi ættarliðum. Tí eiga allir partar at hugsa seg væl um, áðrenn farið verður eftir teimum síðstu áunum í Eysturoy.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Tí gjørdi Miðflokkurin so

Bill Justinussen
landsstýrsimaður
Bill.teletech.fo

Nøkur hava lastað Miðflokkinum fyri, at vit ikki vildu hoppa í leypin saman við hinum móti løgmanni. Spurt verður, um Miðflokkurin nú heldur hondina yvir óreglusemi. Tað gera vit sjálvsagt ikki og tað er als ikki tað, málið fyri okkara viðkomandi snýr seg um. Støða mín í hesum máli er sera einfald:

Rættarsamfelagið
Tað er sera trupult hjá einum vanligum manni at fella dóm yvir ein annan, sum byggir á eitt ákærurit skrivað av tveimum tíðindafólkum. Vit meta, at øll, eisini landsins hægsti maður, hevur krav uppá rættartrygd. Hendan trygdin byggir á, at ongin kann verða dømdur, uttan eina rættarsak. Hesa sak kundi løgmaður ikki fáa, tí málið er fyrnað. Eg kann ikki eins lítið og nakar annar seta meg til dómara í einum máli, har hvørki verjar ella ákærar hava kannað málið og lagt síni sjónarmið fyri ein dómara, sum síðani við síni sera longu og høgu útbúgving og starvsroyndum ger úrskurð í málinum. Eitt ákærurit við prógvum er ikki ein dómur, tí ein dómur metir um øll prógv og gevur tí ákærda rætt til at verja seg við sínum mótprógvum.

Tingmaður Miðfloksins hevur tikið støðu til tann løgmann, sum vit kenna í dag, og sum vit kenna frá tí politiska arbeiðnum. Vit kendu ikki løgmann fyri 25 árum síðani og kunnu sjálvsagt ikki taka støðu til, hvussu hann var tá, og enn minni um hann møguliga hevur broytt seg og er ein annar ídag.

Miðflokkurin og hinir
Miðflokkurin hevur ikki við hesi støðuni sagt, at nú hava vit lagt okkum í føvningin á Fólkaflokkinum. Vit eru ein sjálvstøðugur flokkur við egnum politikki. Vit hava góð viðurskiftir við allar flokkar á tingi og kunnu samstarva við allar flokkar, so leingi vit eru samd um politisku kósina. Persónlig viðurskifti, gamalt agg og kegl hoyrir ikki heima á politiska vígvøllinum. Tíverri hava báðir teir størru samgonguflokkarnir nýtt ov nógva orku at viðgera stríðsspurningar, sum ikki hava við politikk at gera. Hetta kegl havi eg ongantíð givið mær stórvegis far um, tí hetta havi eg mett sum smálutir í mun til tey týðandi politisku málini, vit eru samd um at arbeiða fyri. Hóast hetta gjørdi keglið enda á politisku kósini. Vónandi ger veljarin sær nakrar tankar um, í hvønn mun hesir flokkar og persónar eru førir fyri at halda fram á politiska pallinum eftir valið.

Miðflokkurin vil fegin halda fram við tí politiska arbeiði, vit nú hava byrjað. Ongin ivast í, hvørji okkara sjónarmið eru.

Farvæl loysingin, góðan dag Føroyar

Alfred Olsen
Løgtingsmaður fyri
Sambandsflokkin

Gamlaárskvøld eru tað nógv fólk, sum geva lyfti um, at nú skal broyting vera í lívi teirra til gagns fyri seg sjálvi og familjuna.

Yvirskriftin er soleiðis eitt lyfti frá Sambandsflokkinum til Føroya fólk um, at vinna vit valið 20. januar 2004, so merkir tað farvæl til loysingina og góðan dag til menningina av Føroyum.

Økt almennar útreiðslur við góðari milliard
Men hví skulu føroyingar siga farvæl til loysingarsamgonguna ? Tí umframt at seinka menningina av okkara vinnulívi, leggja øktar avgjaldsbyrðar á borgararnar og darva kommununum í at fremja loysnir til gagns fyri vinnulívið og borgararnar, so hava loysingarlandsstýrini síðani 1998 økt tær almennu útreiðslurnar við eini góðari milliard, og av tí størsta vøkstrinum, stendur tað almenna (landsstýrið) fyri 790 milliónum.

Teir tosa um ein sjálvberandi føroyskan búskap, men fremja í verki tað øvugta, við einum øktum almennum forbrúki, uppá heili 9% í meðal um árið. Men hetta er ein náttúrlig fylgja, tá høvuðsreglan er, "sektin á hvat annar fær, eg skal nøra at mær" og sama er galdandi, tá talan er um magt, hugsið bara um atburð løgmans 5. des. 2003. Í demokratiskum londum fáa slík stýrir durafjóringin á valdegnum.

Góðan dag Føroyar
Sambandsflokkurin vil fegin heilsa Føroyum góðan dag, við eini nýggjari byrjan, har allar kreftur verða brúktar til at menna vinnulívið á sjógvi og landi, menna tað føroysku mentanina, menna tað føroyska heilsuverkið, menna tað føroyska skúlaverkið, menna almannaverkið v.m. og saman við kommunum virka við til at gera tað gott hjá tí føroyska fólkinum at virka og liva í Føroyum.

Samanhald
Latið okkum tí standa saman á valinum 20. januar 2004 og á ein virðiligan og avgjørdan hátt siga loysingini farvæl og heilsa Føroyum "góðan dag", við eini nýggjari mennandi og stimbrandi byrjan.

Fráboðan

Vísandi til lesarabrævi í Dimmalætting og Sosialinum 12. desember undir yvirskriftini **Næstakærleikin hjá Miðflokkinum.**

Tað er ikki Sjálvstýrisflokkurin, ið umboðar sjónarmiðini í áðurnevnda brævi, men persónurin Kenneth Rasmussen.

Vegna Sjálvstýrisflokkin
Kári P. Højgaard
Floksformaður.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstaðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[30]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjáplass má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Ein heilag kúgv?

Finnleif Guttesen

Er búskaparráðið sum ein heilag kúgv, í eingin hevur dirvi til at røra, lasta ella rósa, nú tað er barslað við einari »Frágreiðing 2003«, sum eftir mínari meining sigur »Neyð lærir nakna kvinnu at spinna«.

Tað hevði verið áhugavert at vitað, um hendan frágreiðingin hevði verið líka fýrakantað, um t.d. tvey fólk, sum arbeiða á »gólvinum« høvdu verið við til at skrivað hana.

Fjølmiðlarnir
Gud viti hvar teir eru, tí tað, sum teir hava borið fram frá búskapránum er loysingarorðið »eingin studningur« og einki annað.

Teir seta ongar spurningar um t. d.

- Hvat við arbeiðsplássum á landi, um allur fiskur kann flytast óviðgjørdur av landinum?
- Hvat við arbeiðsplássum á landi, um allur fiskur undan Føroyum bleiv viðgjørdur umborð á skipum?
- Hvat hevði hent, um bert trolarar sum Skálaberg fiskaðu undir Føroyum?
- Hvat er tað fyri studningur sum avger, hvussu nógv fólk eru um borð á fiskiskipum?
- Hvat er tað fyri studningur sum ávirkar, hvar flakavirkir liggja í landinum?
- Er tað skilagott, at vinnan sjálv ger regluverk um fiskiskap og um, hvør sleppur at fiska, nær. hvar og hvussu?
- Skal eingin studningur latast um øll fiskivinnan fer á heysin?

Tað er undir allan kritik, at fjórða statsmaktin ikki tráspyr hesi skilafólk í búskaparráðnum um, hvat tey veruliga meina, tí tey skuldu ikki fingið loyvi til at slongt hesi tilmæli út, uttan viðmerkingar um avleiðingarnar.

Niðurstøðan
Tað sum kemur fram í frágreiðingini er, at fiskurin skal seljast, har mest fast fyri hann, og at alt fiskaarbeiði skal fara fram í miðstaðarøkinum ella umborð á fiskiskipunum.

Búskarráðið mælir óbeinleiðis til, at útjaðarin skal avtoftast, tí tað er ikki lønandi at hava nakað virksemi uttan fyri miðstaðarøki.

Livst so spyrst.

Latið fólki trivnaðarjørð

Heðin D. Poulsen
[hedin@odalsfelag.org]

Tað átti ikki at verið so trupult hjá íbúgvum í høvuðsstaðarøkinum at fingið møguleikan at keypt jørð, tá tað er nóg mikið av almennari jørð í høvuðstaðarøkinum.

Í høvuðsstaðarøkinum eru fitt av fólki, ið eru áhugað at fáast við jarðarbrúk í teirra frítíð, tað verður seg at hava seyð, gæs ella annað tilíkt at putlast við í frítíðini.

Trupulleikin hjá íbúgvum í høvuðsstaðarøkinum er tó tann, at fyri nógv skulu tey út um garðarnar fyri at fáa íðkað sítt frítíðarítriv. Hetta sjálvt um tað er nóg mikið av jørð í høvuðsstaðarøkinum, almenn jørð. Sjálvandi er tað ein gleði í sjálvum sær at koma út um Havnina við hvørt, men nógv høvdu fegin vilja havt møguleikan at íðkað sítt ítriv tættari høvuðsstaðnum, og tað sæst aftur á tí langa bíðilistanum hjá Tórshavnar Kommunu fyri at fáa eina leigutrød ella eitt urtagarðsstykki.

Tað einasta rætta at gera er at lata fólkið koma framat jørðini. Ein partur av tí almennu jørðini í høvuðsstaðarøkinum átti at verið seld í smáar lutir til tey, ið ynskja sær tilknýti til frítíðarjarðarbrúk. Ein partur av uttangarðsjørðini kundi verið seld og skipað sum felagshagi við kravinum, at eingin kundi keypa meira enn eina ella tvær gyllin. Innangarðsjørðin kundi eisini verið seld í minni lutum.

Um tað seinni vísir seg, at tað er tørvur á jørðini til almenn endamál, eitt nú bústaðarútstykking ella almenna bygging, kann ásetast í skeytinum, at tað almenna hevur rætt at keypa jørðina aftur fyri sama prís plus eina prístalsregulering.

Eitt er vist, at tað átti ikki at verið neyðugt, at tað almenna í ár 2004 skal eiga og reka búnaðarjørð umkring allan høvuðsstaðin. Tey, ið ynskja at reka jørð sum eitt ítriv, eiga at fáa møguleikan at koma framat, latið fólkið keypa jørðina.

Økismenningin sum hvarv

Johan Dahl
løgtingsmaður fyri
sambandsflokkin

Økismenningarálit, Útjaðaraálit, Granskingardepil fyri Økismenning osfr, osfr.

Spurningurin er: Hvar bleiv menningin og ætlanin fyri menningini í útjaðaranum av?

Hendan samgongan nýtti stór orð og stór armsveiggj við m.a. omanfyri nevndu álitum og stovnan av granskingardeplinum fyri økismenning, men satt at siga, so er økismenningarpolitikkurin og útjaðarapolitikkurin hjá nú farnu samgongu sera trupul at fáa eygað á - mikroskopið skal á borðið, um tjansur skal verða at síggja nakað yvirhøvur.

Ungdómurin og barnafamiljurnar mugu fáa møguleika at venda aftur til heimaøkið.

Hvat er t. d. gjørt fyri at okkara framtíð - ungdóminum - sum leitar sær góðar útbúgvingar í útlondum?

Skal hesin ikki hava møguleika fyri at koma heimaftur til sítt uppruna-økið í útjaðaranum, aftan á loknar útbúgvingar?

Tað má verða eitt aðalmál hjá øllum fólkavaldum politikkarum at arbeiða fyri at hesin møguleiki gerst veruleiki.

Møguleikar mugu og skulu skapast fyri at barnafamiljurnar, sum vælútbúnar koma aftur til klettarnar fáa møguleikan at venda heim til sítt upprunaøki og starvast har.

Tit sum lesa hetta - hugsið um hvat er gjørt í m.a. tykkara øki? Verður nakað gjørt yvirhøvur?

Vinnan í útjaðaranum:
Hvat er gjørt fyri, at vinnan í útjaðaranum skal hava somu kappingarparametur, sum vinnan á meginøkinum?

Fráfarna samgonga hevur verið alt annað enn vinnuvinarlig - hon hevur verið vinnuskaðilig.

Flutningsstuðulin er minkaður og verður skerdur enn meira, um farna samgonga sleppur framat aftur.

Neyðugt er við nýhugsan og eini langtíðarætlan, hvussu útjaðaranin kann mennast og framhaldandi verða størsta ískoytið til landshúsarhaldið.

Dagstudningurin til útróðrarmenn skerdur, um Fólkaflokkurin ræður fyri borgum:

Hvat verður gjørt fyri at útróðrarmaðurin skal hava góð kor at virka undir?

Jú, seinasta uppskotið frá Fólkafloksmonnum »Uppskot til løgtingslóg um mánaðarligan minstaforvinning - mál nr. 28/2003« varð at skerja dagstudningin hjá útróðramonnum og gera tað truplari at fáa dagstundning.

Eg spyrji bara - er hetta góður menningar - og útjaðarapolitikkur??

Er hetta - at geva hjartanum í føroyska samfelagnum - fisikimannnunum - góð kor at arbeiða undir??

Alivinnan og stóri týðningur hennara fyri útjaðaran.

Alivinnan má fáa tryggar karmar at virka undir, og alt sum stendur í makt politiska mynduleikans má gerast fyri, at allir involveraðir partar hava trygg løgfrøðislig og politisk kor at virka undir.

Heldur ikki í hesi vinnu hevur Fólkaflokkurin megnað at fáa greiðar karmar og loysnir, sum tæna vinnu og samfelagnum best uppa sikt - hvar er hesin liberali vinnuflokkur blivin av??

Sambandsflokkurin vil, um vit eftir valið 20 januar sita í landsins leiðslu, virka fyri, at økimenningin verður høgt raðfest og fær bestu sømdir eins og høvuðsvinnur okkara, fiskivinnan og alivinnan fáa tryggar karmar at virka undir.

Nólsoy undir Havnina

Jógvan Arge
Býráðslimur fyri
Tjóðveldisflokkin

Tórshavnar Býráð fer á fundi hóskvøldið at viðgera eina áheitan frá Nólsoyar Kommunu um at leggja kommununnar saman ella at víðka samarbeiðið teirra millum. Henda áheitan er eitt gott høvi til enn eina ferð at hugsa um spurningin um samanlegging av kommunum sum heild.

Havnin hevur lagt saman við Kaldbak, Argjum, Norðradali, Syðradali og Kollafirði og avrátt er at leggja saman við Kirkjubø og Velbastað. Hetta eru alt eindir í Suðurstreymi, sum landfast er ímillum.

Orsøkin hjá nólsoyingum at tingast við Havnar Kommunu er ætlaða gongdin at leggja størri og kostnaðarmeiri ábyrgdir á kommununnar. Tað krevur størri og figgjarliga sterkari eindir.

Ein høvuðsspurningur í øllum hesum prátinum er kortini: Hvussu skilagott er tað, at núverandi kommunur totalt leggja seg undir aðrar størri grannakommunu?

Nólsoy og Tórshavnar Kommuna eru ikki ein samanhangandi landafrøðilig eind. Nólsoy er ein oyggj fyri seg, og sjógvur er ímillum.

Allir nólsoyingar eru ofta í Havn, meginparturin arbeiðir kanska í Havn, men tað eru nógv fólk í Havn, sum ongantíð hava sett sín fót á land í Nólsoy og hava fá felags áhugamál við nólsoyingar.

Nólsoyingar hava eisini brúk fyri eldrarøkt, barnaansing, barnavernd, skúlum og øllum tí, sum aðrar kommunur hava brúk fyri, men eru ikki førir fyri at greiða hesi mál einsamallir, tá málsøkini verða kommunal burturav.

Men nólsoyingar eru og verða teir bestu til at taka sær av sínum egnu áhugamálum í nærumhvørvinum.

Nú høvið býðst, eigur orðaskiftið fyrst at snúgva seg um víðkað samarbeiði millum Tórshavnar Kommunu og Nólsoyar Kommunu. Í hesum orðaskifti eigur ikki bert at verða lagdur dentur á tað, sum Nólsoyar Kommuna ikki megnar. Vit skula eisini leggja dent tá tað, sum Nólsoyar Kommuna megnar betur enn ein samanløgd kommuna.

Loysnin kann eins væl verða ein nýggjur samarbeiðsformur millum ta stóru høvuðsstaðarkommununa og ta lítlu grannaoynna, har nólsoyingar varðveita sítt sjálvræði á teimum økjum, sum tað er nattúrligt at nólsoyingar sjálvir hava í hondum.

Tær staðbundnu nevndirnar, sum higartil eru stovnaðar í bygdunum, ið hava lagt seg undir Havnina, hava tíverri lítið vald. Tær kunna bara ummæla og hava onki umsitingarligt bakland at gera nakað fyri seg. Strangt tikið verða tær antin lopnar um ella drignar eftir hárinum.

Høvi er nú at seta nýggja stevnu. Hon kann vera: Latið myndugleika verða eftir í bygdunum til tey málini, sum bygdirnar megna sjálvar. Vissið teimum harnæst eitt væl skipað samarbeiði við eina stórri eind um tær stóru uppgávurnar.

Samarbeiðið eigur ganga báðar vegir. Tað kann ikki bara vera hertøka og yvirgeving.

Onkur tileggjan at ráða fyri egnum umhvørvi má vera eftir, tí avreiðing av allari ávirkan á egin viðurskifti er meiningsleys.